

## So tapti Skotland

Mikukvøldið spældi odddaliðið í okkara EM-bólki, Skotland, á útivølli ímóti Ukraina. Skotar hava vunnið fyrstu tríggjar dystirnar í bólkinum, og seinasta vunnu teir rættiliga óvæntað ímóti Fraklandi. Hesaferð gekk ikki hjá skotum, so máttu lúta 2-0 fyri Ukrina. Kucher skoraði eftir ein tíma, og stutt fyri leiklok økti Schevchenko til 2-0. Móti endanum av dystinum fekk Skotland eisini Stephen Pressley vístan av vøllinum.

## Italia vann aftur

Ikki fyrr enn Georgia hevði fingið ein spælara vístan av vøllinum, slapp Italia frá Georgia og vann at enda 3-1. 60.000 áskoðarar vóru til dystin á tjóðarleikvøllinum í Tblisi í Georgia. Italia kom á odda longu eftir 18 minuttir, men lítla løtu seinni javnaði Shashiashvili fyri Georgia. Javna støðan helt sær, til Georgia fekk ein spælara útvístan. So skoraði Carmoranesi til 2-1, og Perotta gjørdi tað til endaliga úrslitið 3-1. Italia hevur nú fingið fótin fyri seg í bólki B og hevur vunnið tveir teir seinastu dystirnar.

# Heimsklassin móti pinkulin

**Franska landsliðið vísti, hvør munur er á varaheims-meistarunum og tjóðini, sum er styrkismett sum nummar 179. Fram til seinasta korterið var leiðslan tó avmarkað til 2-0, men tveir svangir áleyparar í heimsflokki fingu skotið tríggjar seymir afturat í føroysku kistuna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Sochaux, Frakland: -** Hvør minuttir, sum gongur, uttan at Frakland skorar, er ein sigur fyri okkara menn.

Soleiðis segði føroyski landsliðsvenjarin undan dystinum móti varaheims-meistarunum, og í so máta gjørdist talan ikki um nógvar sigrar á hesum sinni.

Við málinum til 1-0 eftir bara 38 sekundum setti Louis Saha nevnliga nýtt met fyri skjótast mál móti føroyska landsliðnum, og samstundis sendi Frakland eina greiða ávaring um bumbuhóttan móti føroyska landsliðnum. Pinkutjóðini, sum var komin á vitjan hjá næst sterkasta landsliðnum í heiminum, um HM-kappingin í summar skal takast sum útgangsstøði.

Tað vóru kanska eisini bara tey allar mest optimistisku, sum trúðu upp á møguleikan fyri eini veruligari føroyskari sensatión, og hendan vónin gjørdist altso alt fyri eitt kámari. Eisini hóast føroyska liðið í næstu minuttunum hevði sína helst bestu løtu, tá vit vunnu okkum eini tvey frísporк í hampuliga góðum støðum, eins og eitt hornaspark eisini var á skránni.

Men tað stóð kortini púrasta greitt, at tað var ikki tað heilt stóra, sum okkara menn kundu gera. Ikki annað enn at avmarka tapið í mest møguligan mun.

### Millióningarnir spardu seg

Og tann setningin røkti liðið fyri tað nógva. Stóri trupulleikan fyrstu longu løtuna, tóktist vera, at vinstra borð hjá okkum í ov lítlan mun var stillað rætt inn, og tí fingu Sagnol av bakkinum og Ribery á kantinum alt ov góðar treytir at koma til innlegg. Og í tveimum av hesum sviku føroysku markeringarnar við handaru stong.

Eftir hetta fingu okkara tó loyvi at koma longur niðan. Hjá fronsku stjørn-unum er talan aftur um arbeiðsdag leygardagin, tá týdningarmiklar uppgerðir standa á skránni fyri feløg teirra, og við vikulønum í millióna-flokkinum er ein skaði í slíkum dysti ikki tað besta av hava heim við sær aftur. Tí var føroyska liðið fyri tað nógva í teirri sjáldsomu støðu, at bólthaldarin sjáldan varð trýstur serliga nógv á egnari hálvu, og tað gav góðan frið yvir spælið. Somikið góðan frið, at tað eina langa



## FAKTA um dystin

**Frakland-Føroyar 5-0 (2-0)**
*EM-undankappingardystur á Stade Bonard í Sochaux, Fraklandi*

**19.314 áskoðarar**
**1-0:** Louis Saha, 1.
**2-0:** Thierry Henry, 22.
**3-0:** Nicolas Anelka, 76.
**4-0:** David Trezeguet, 77.
**5-0:** David Trezeguet, 84.
**Dómarabólkur úr Rumenia:** Soin Corpodean, George Adrian Vidan, Miklos Istvan Nagy, Augustus Viorel Constantin.
**UEFA umboðsmaður úr Ungarn:** Istvan Huszar

**Frakland:** 1. Mickael Landreau (Paris SG, 4 dystir/0 mál) – 19. William Sagnol (Bayern München, 50/0) (13. Francois Clerc (Lyon, 1/0), 78.), 15. Lilian Thuram (Barcelona, 125/2), 5. William Gallas (Arsenal, 51/2), 17. Julian Escude (Sevilla, 1/0) – 22. Franck Ribery (Marseille, 15/1), 4. Patrick Vieira (Inter Milan, 99/6), 8. Jeremy Toulalan (Lyon, 0/0), 7. Florent Malouda (Lyon, 24/3) – 14. Louis Saha (Manchester United, 17/4) (20. David Trezeguet (Juventus, 68/34), 61.), 112. Thierry Henry (Arsenal, 90/38) (39. Nicolas Anelka (Bolton Wanderers, 32/8), 61.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Sebastian Frey (Fiorentina, 0/0), 2. Jean-Alain Boumsong (Juventus, 21/1), 11. Sylvain Wiltord (Lyon, 91/26), 18. Alou Diarra (Lyon, 11/0)
**Venjari:** Raymond Domenech

**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen (B36, 46/0) – 4. Atli Danielsen (KÍ, 17/0), 3. Vagnur Mohr Mortensen (HB, 3/0), 7. Fróði Benjaminsen (B36, 40/2), 2. Marni Djurhuus (EB/Streymur, 2/0) – 9. Jákup á Borg (HB, 47/2) (14. Jónhard Frederiksberg (Skála, 13/0), 88.), 8. Mikkjal Thomassen (B36, 2/0), 11. Pauli G. Hansen (Skála, 5/0) (12. Kári Nielsen (HB, 6/0), 46.), 5. Símun Samuelsen (Kaflavík, 7/1) – 10. Christian Høgni Jacobsen (NSÍ, 31/2), 6. Rógvi Jacobsen (HB, 40/6)
**Gult kort:** Marni Djurhuus, 18.
Á beinkinum uttan at koma inn: 16. Meinhardt Joensen (KÍ, 0/0), 13. Herbert í Lon Jacobsen (B36, 0/0), 15. Janus M. Joensen (HB, 3/0), Rasmus Nolsøe (HB, 0/0), Arnbjørn Hansen (EB/Streymur, 1/0)
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen